# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Móttøka fyri Natta



*Niels Nattestad hevur lagt frá sær eftir at hava starvast 36 ár á Venjingarskúlanum*

**Stjórin á Venjingarskúlanum seinastu tíggju árini, Niels Nattestad, hevur lagt frá sær eftir 36 ár á skúlanum. Í hesum sambandi var móttøka á skúlanum fríggjadagin 22. juni**

MÓTTØKA
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Eftir tíggju ár í stjórasessinum hevur Niels Nattestad, vanliga nevndur Natte, lagt frá sær sum stjóri á Venjingarskúlanum.

Á fráfaringarsamkomuni vórðu hildnar fleiri røður, eins og bæði sangur og tónleikur varð framførdur. Røður vórðu hildnar av millum øðrum, varaskúlastjóranum, umboðum fyri lærararnar, skúlastýrinum, stjóranum á Læraraskúlanum og borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu, sum handaði Natta ein málning av Edward Fuglø, listamanni, sum gávu.

Natte er hvalbingur, men hann hevur búð í Havn í umleið hálvthundrað ár. Hann tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1971, og síðani hevur hann arbeitt á Venjingarskúlanum. Í 1980 gjørdist hann varaskúlastjóri, og síðani 1996 hevur hann verið skúlastjóri. Hann hevur sostatt starvast á Venjingarskúlanum í 36 ár.



*Oddvá og Niels Nattestad og ein ommu- og abbadóttir*



*Oddvá Nattestad saman við døtrunum Finnbjørg og Beintu og øðrum*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, handaði Natta ein málning av Edward Fuglø, listamanni, sum gávu*

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Jastrid Olsen,** vanliga nevnd **Jastrid á Toft**, verður í Húsarvíkar kirkju týsdagin klokkan 12. Tey, sum vilja minnast Jastrid, kunna lata eina gávu til Dals kirkju, kontur í Eik ella Føroya Banka

**Berint Berhtelsen,** Strendur, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 14. juli, 66 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni

**Knút Sonne Olsen,** Funningur, andaðist 14. juli, 77 ára gamal. Kistan fer frá Ellis- og røktarheiminum í Runavík í dag klokkan 17.00 til Funnings. Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju týsdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Sonna, kunnu lata Ellis- og Røktarheiminum í Runavík eina gávu

**Dan Hammer**, 62 ára gamal, ættaður úr Hovi, búsitandi í Arendal í Noregi, andaðist í heiminum fríggjadagin 13. juli. Jarðarferðin verður úr Arendal Kapel fríggjadagin 20.juli kl.12.30. Um onkur vil sýna samkenslu við blómum ella kransi, kunnu tey í staðin lata eina gávu á kontu 6460-4786582.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin, 17. juli, hava **Solveig og Christoffer Ripley** í Vági, silvurbrúdleyp.
Tey eru burturstødd.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra mamma mín, vermamma, omma, langomma og systir,

**Sofía Christiansen**
**Gjógv**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Emil Olsen prest, fyri troystarrík orð á Ellis- og røktarheiminum í Runavík og í kirkjuni við Gjógv.

Tøkk til Tord Niclassen og starvsfólk á Ellis- og røktarheiminum í Runavík fyri umsorgan og hjálpsemi.

Tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hava hjálpt henni og vitjað hana.

Tøkk til berarar, sangarar, kirkjutænarar og tykkum, sum hjálptu til við ervi og fyri peningagávu til Ellis- og røktarheimið í Runavík.

Tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Christian Martin, Marita, Petur Pauli, Anna, Súni og Dávid**